**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Jonhard Mikkelsen*

# Rætturin at velja tann, tú veruliga vilt hava á ting

## Íkast til kjakið at varðveita Føroyar sum eitt valdømi

**Málið snýr seg um ein rætt, sum fólkaræðið gevur okkum: Vel ein góðan politikara, so hevur tú ávísa ávirkan á, hvussu samfelagið verður skipað. Tú hevur at kalla onga ávirkan, men hetta er so tann møguleiki, tú hevur.**

**Spurningurin er: hvørja ávirkan hevur tú, tá ið tú IKKI sleppur at velja tann á ting, sum tú vilt hava á ting? Ella uppaftur verri: hvussu stóran skaða gert tú, tá ið tú ferð eftir ferð velur »skeiv« fólk inn á ting, tí tú ongan annan valmøguleika hevur?**



*– Í Tinginum hevur verið trúttað niður í fólk, at Havnin hevur fingið nóg mikið, og tí skulu íløgur ikki gerast í landsins besta studentaskúla – gerið heldur íløgur úti á bygd. Úrslitið er, at flaggskipið er um at verða stongt, er soppafongt og pínliga ótíðarhóskandi, heldur Jonhard Mikkelsen*





*– Hví var politisk semja um at brúka eina milliard krónur til eitt hol til Sandoynna? Við allari virðing fyri Pálli og Gerhardi, so kenni eg meg ikki sannførdan um, at vísdómur teirra er verdur hálva milliard pr. stk., sigur Jonhard Mikkelsen*

Er nakað at siga til, at so nógvir vánaligir politikarar hava sitið á tingi millum ár og dag, tá ið vit ikki geva okkum sjálvum møguleikan at velja tey bestu?

Og hvussu mangan hendir ikki júst tað, tá ið tú ert búsettur í lítlum, politiskt øskukøldum valdømi?

Tað er sum at vinna í happadráttinum bæði at búseta seg á bygd og sleppa at velja fólk inn á ting, sum eiga at sleppa at sita har. Skipanin, ið var, bant ov nógv okkara politisku evni og kraft niður. Eitt valdømi loysti hesar óneyðugu bindingar og gjørdi okkara lítla land nógv størri og politiskt sterkari.

Ávirkanin var eyðsýnd: fólk valdu øðrvísi. Fleiri breyðpolitikarar vórðu ikki valdir innaftur. Nýggj fólk sluppu framat.

Tey, sum fólkið vrakaði, komu inn gjøgnum bakdyrnar, sita nú aftur á tingi og virka nú fyri at skrúva tíðina aftur, binda okkum niðuraftur, tí á tann hátt eru teir betur tryggjaðir.

Flestu fólk við teimum bestu førleikunum og teimum bestu útbúgvingunum búgva í Havn. Tann politiska skipanin skal tryggja, at so fá teirra, sum til ber, sleppa framat at brúka førleikan. Tey SKULU koma av bygd.

Er nakað at siga til, at bestu heilar landsins ikki koma aftur?

Vit hava eina politiska skipan, sum virkar fyri at avmarka, hvussu nógv skal fáast burtur úr heila- og útbúgvingarkapasitetinum í Havn.

Á sama hátt sum vit smíða lógir, sum tryggja, at vit ikki bryggja tað besta ølið, vit kunnu bryggja í landinum, smíða vit lógir, sum forða fyri at meira enn eitt vist av førleikanum í Havn verður brúktur í tinginum. Hvussu forbannað smalur kann maður verða?

Í Tinginum hevur verið trúttað niður í fólk, at nú var Havnin nóg væl stuðlað – Ikki gera íløgur í landsins besta studentaskúla – ger íløgur úti á bygd – úrslitið í dag er, at flaggskipið er um at verða stongt, tí tað hevur fingið alt ov lítlan pening til røkt og nýgerð. Høvuðsborgin er soppafongd og pínliga ótíðarhóskandi. Landsins frægastu ungu heilar, tey, sum um nøkur ár skulu koma aftur til okkara sum búskaparfrøðingar og læknar og havfrøðingar, hava ringastu skúlakor - orsøkin er politisk skeiklað raðfesting. Flott!

Landssjúkrahúsið hevur ikki ráð at senda síni starvsfólk á skeið, tí peningurin skal verða javnaður út á trý sjúkrahús. Øll trý húsini ana, og eingin fær nóg mikið. Flott!

Hetta er sama sjúka sum tá ið hvør bygd hevði sítt flakavirki við tí úrslitið, at øll fóru á húsagang, tí tað var ikki nóg mikið av fiski til øll.

Hetta var ørskapur, og hesin ørskapur hevur bara borið til, tí vit høvdu eina skeiva valskipan.

Hví var politisk semja um at brúka 1 milliard til eitt hol til Sandoynna oman á gøluna og upptakið við Gomlurætt og brølara-framhaldssøguna í Skopun, samstundis sum vit hava ikki ráð at geva krabbasjúkum optimal kor, ikki hava ráð at venja fólk uppaftur, sum hava fingið álvarsligan løst, ikki hava ráð at hava skúlarnar dagførdar, ikki hava ráð at reka eitt landsbókasavn?

Svarið var einfalt: tí at tríggir flokkar kappaðust um at fáa ein politikkara av Sandoynni á ting. Teir eru bíligir í atkvøðutali á Sandoynni, men garparnir av Sandi kostaðu okkum skattgjaldarum í hesum føri ½ milliard hvør, og við valskipanini kundu teir trýsta ørskapin ígjøgnum. Við allari virðing fyri teirra bjarta intelligensi, við allari virðing fyri teirra statsmansevnum og politiska tevi, so kenni eg meg sannførdan um, at vísdómur teirra Páls og Gerhards er ikki tað verdur hálva milliard pr. stk. heila.

Besta tekin um, at Edmund Joensen veruliga skilti, hvat tað er, at vera landspolitikari, er, at allir teir, sum sleppa inn á ting, grundað á lyfti um ikki at vera landspolitikarar men bara forlongdir armar hjá ávísum bygdum ella kommunum, er, at teir koma bak á bak fram nú og tosa um tann órætt, bygdunum verður fyri.

Píniliga avdúkingin er, at annar sannleiki kemur fram í goraganginum: nú hava politiskt at sær komin bydarfólk endiliga fingið tað frælsið, teimum altíð hevur longst eftir - frælsið at velja tey, tey veruliga vilja hava á ting, og ikki bara onkran við politiskum ambitiónum og kanska ikki samsvarandi evnum, sum hevur búsett seg í nánd av teimum.

At fara aftur til fleiri valdømi nú er at gera hetta lítla landið nógv minni enn tí tørvar at vera. Tað fer at taka demokratiska rættin frá okkum at fáa tey fólk inn á ting, vit vilja hava at sita har og fer at taka seinasta dropan av politiskari motivatión frá fólki.

**Tíðargreinin**